# Endaspælið er bara 6–8 ár burtur

**Jógvan Martin Olsen heldur menningina, sum hevur verið síðani graslíkisvallirnir komu og spælararnir frá heilt ungum av fingu høvi at royna seg í landsdystum, hava verið so góða, at tað avgjørt ikki er veruleikafjart at rokna við møguleikanum, at Føroyar um 6-8 ár fara at spæla seg í EM ella HM endaumfar**

JÓANNES HANSEN

Vit eru so smáir, vit megna so lítið, og vit fara ongantíð at koma í nánd av nøkrum endaumfari í fótbólti. Tað er og fer altíð at vera soleiðis, at tá ið endaspølini eru og vera á skránni, so verður tað okkara lutur at halda við Onglandi, Danmark ella onkrari aðrari av teimum eftir okkara máti stóru fótbóltstjóðunum.

Hetta hevur verið vanligur føroyskur hugsunarháttur. Men Jógvan Martin Olsen, sum síðani í 1994 hevur havt ábyrgdina av yngru landsliðunum, og sum síðani 1996 hevur verið hjálparvenjari hjá fyrst Allani Simonsen og síðani Henrik Larsen, heldur tað vera ógrundað ikki at halda meiri um framtíðina hjá føroyskum landsliðsfótbólti enn so:

– Eg haldi, at vit hava góðar orsøkir til ikki bara at droyma um, men eisini at rokna við møguleikanum, at tað um eini 6-8 ár fer at eydnast føroyska landsliðnum at spæla seg í EM ella HM endaumfar.

*Hetta eru nýggir tónar fyri føroyskan fótbólt?*

– Men teir eru ikki burtur úr vón og viti, undirstrikar Jógvan Martin Olsen, og hann grundgevur beinanvegin:

– Vit kunnu taka støði í EM undankappingarbólkinum, sum vit nú eru í. Har eru trý lið, sum hava sjey stig í part, Ísland hevur trý stig, og vit hava eitt stig. Tey trý londini, sum hava sjey stig, eru Týskland, Skotland og Litava. Vit hittu tey øll í fjør. Ímóti Skotlandi fingu vit eitt stig á heimavølli. Vit áttu at havt vunnið øll trý stigini. Ímóti Týsklandi kundu vit havt megnað javnleik. Í Litava stóðu vit okkum ikki væl. Vit taptu 2-0, men vit hava áður víst, at vit eiga at megna at spæla upp til Litava. Eg hugsi eitt nú um málleysa dystin har yviri í oktober í 1998.

Men tað tú nevnir eru einstøk úrslit. Ofta tapa vit við tveimum og trimum málum og onkuntíð meiri enn so ímóti stóru tjóðunum?



– Eg haldi, at vit hava góðar orsøkir til ikki bara at droyma um, men eisini at rokna við møguleikanum, at tað um eini 6-8 ár fer at eydnast føroyska landsliðnum at spæla seg í EM ella HM endaumfar, sigur Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjari hjá føroyska landsliðnum.

Mynd: Álvur Haraldsen

– Tað kemur framvegis fyri, og tað fer eisini í framtíðini at koma fyri, at vit tapa við fleiri málum, sjálvt um tað verður longi millum tapini og serliga longri millum stóru tapini. Men í miðal hava vit seinnu árini staðið okkum alt betri. Vit hava tapt ímóti Kekkia við einum máli, og vit hava spælt javnleik ímóti Bosnia-Hersegovina. Kekkia kappast við Holland um fremsta plássið í teirra EM undankappingarbólki, og Bosnia vann 2. apríl 2-0 í Parkini og spældi danska landsliðið sundur og saman. Alt hetta sigur mær, at vit eru á góðari leið, og um framburðurin fer at halda fram, so dugi eg væl at ímynda mær, at tað ikki fara at ganga so ógvuliga nógv ár, áðrenn vit sleppa upp í part millum tey stóru. Ikki hvørja ferð, men vit fara at fáa møguleikan, heldur Jógvan Martin Olsen.

## Orsøkirnar

Seinastu árini hava Føroyar átt fleiri spælarar, sum hava staðið seg heilt væl í grannalondunum. Felags fyri nógvar av hesum er, at teir nú eru um at fara um besta fótbóltsaldurin. Hesin veruleikin leggur upp til spurningin, um tað ikki fer at verða ivaleysa torført at varðveita støðið, sum landsliðið nú er á, og tískil óhugsandi at rokna við framvegis framburði.

– Í landsliðshøpi er eitt av málunum hjá okkum, at vit ikki skulu merkja nakað serligt til ættarliðsskiftini. Tað er rætt, at nakrir av mest royndu spælarunum neyvan fara at spæla á hægsta støði fleiri ár afturat. Men legg til merkis, at tað hava kanska ongantíð verið so nógvir ungir spælarar við í kappingini um landsliðsplássini, sum tað eru nú. Eg vil siga tað soleiðis, at heldur enn at ansa eftir, at miðalaldurin verður ov høgur, sum plagar at vera keðiligur trupulleikin viðhvørt, so mugu vit ansa eftir, at vit ikki heilt skjótt fara at eiga eitt ov ungt landslið. Tað er týdningarmikið at varðveita blandingina. Men tað er ein veruleiki, at alt fleiri ungir spælarar vísa landsliðsstøði, heldur Jógvan Martin Olsen, sum leggur afturat, at tað hevði kanska ikki verið neyðugt at tikið blaðungar spælarar inn á landsliðið, um U-21 landsliðið hevði verið at ment teir á. Men fyribils hevur FSF valt ikki at hava U-21 landslið, og tí kemur tað meiri enn so fyri, at ungir spælarar verða tiknir framum marginalspælarar á A-landsliðnum.

At tað nú tykjast vera fleiri spælarar við altjóða dygdum, enn tað kanska hava verið áður, heldur Jógvan kemst av tveimum høvuðsorsøkum. Onnur er graslíkisvallirnir og betraða venjingin, sum fleiri feløg hava bjóðað í yngru deildunum seinnu árini, og hin er, at FSF hevur lagað tað soleiðis, at ungu spælararnir eru slopnir at royna seg í landsliðshøpi frá tí, teir hava verið 14-15 ára gamlir.

– Dreingirnir, sum nú koma til, vita ikki um annað enn graslíkisvallir, og tað sæst aftur í førleikanum hjá teimum. Sum 15 ára gamlir fáa teir fyrstu landsliðsavbjóðingarnar. Tá ið teir so verða úttiknir til A-landsliðið hava fleiri teirra spælt 20-25 altjóða dystir. Tí vita teir, hvat tað snýr seg um. Teir hava royndir at spæla undir trýsti, og teir hava hesi seinnu árini aftur og aftur víst í U-17 og U-19 landsdystum, at teir megna tað, sigur Jógvan Martin Olsen.

## Royndirnar og snuddirnir

Jógvan Martin er nú farin undir 10. árið sum landsliðsvenjari hjá teimum ungu, og hann minnist væl aftur og og kennir kanska framvegis sviðan av, tá ið unglingalandsliðini løgdu rygg til tap upp á átta og tíggju mál.

– Tá ið eg kom uppí hetta, vóru vit ikki greiðir yvir, hvat vit vildu. Í unglingalandsdystunum í NM og EM kappingunum var tað ein bardagi fyri at avmarka støddina í tapunum. Vit tosaðu so við royndar menn í hinum fótbóltssambondunum, sum eru við í hesum kappingunum. Eitt nú Hans Bruun Larsen úr Danmark, Nissan Andersson úr Svøríki, Morten Olsen úr Noregi og Greg Simons úr Onglandi. Niðurstøðan var, at vit fóru miðvíst undir at menna spælararnar í staðin fyri bara at fokusera upp á at avmarka tapini. Hetta hevur verið gjørt um somu tíð, sum spælarar, sum bara kenna til graslíkisvallir, eru vaksnir upp, og tað hevur eisini í landsliðshøpi givið úrslit.

Jógvan Martin minnist aftur á, at millum fyrstu spælararnar, sum hann hevði á unglingalandsliðnum, vóru Rógvi Jacobsen, Jákup á Borg, Andrew av Fløtum og Christian Høgni Jacobsen. Síðani er úr 1981 árganginum komin Súni Olsen, frá 1983 árganginum hava Jón Rói Jacobsen og Hjalgrím Elttør og eisini Atli Danielsen verið á landsliðnum, Jan Ingi Petersen er frá 1984, og frá 1985 árganginum er millum aðrar Ingi Højsted, sum er í Arsenal. Summir av hesum hava spælt m. a. ímóti Michael Owen og Joe Cole úr Onglandi og John Arne Riise úr Noregi.

– Vit hava longu aðrar sera dugnaligar spælarar frá 1985 árganginum í 1. deild. Nógvir av hesum vísa ábyrgd í eitt nú livihátti og kosti. Eg haldi ikki, at tað er veruleikafjart at rokna við, at teir, sum júst eru komnir á landsliðið, og teir, sum eru á gáttini til landsliðið, fara at fáa møguleikan í HM ella EM endaspæli, heldur Jógvan Martin Olsen.



# Landsliðið í EM

## EM-bólkur 5

*Týskland, Skotland, Ísland, Litava og Føroyar*

**7. september 2002**
Litava-Týskland 0-2
Føroyar-Skotland (Toftir) 2-2

**10. oktober 2002**
Litava-Føroyar 2-0
Ísland-Skotland 0-2

**16. oktober 2002**
Týskland-Føroyar 2-1
Ísland-Litava 3-0

**29. mars 2003**
Týskland-Litava 1-1
Skotland-Ísland 2-1

**2. apríl 2003**
Litava-Skotland 1-0

**7. juni 2003**
Skotland-Týskland
Ísland-Føroyar

**11. juni 2003**
Føroyar-Týskland (Tórsvøllur)
Litava-Ísland

**20. august 2003**
Føroyar-Ísland (Tórsvøllur)

**6. september 2003**
Ísland-Týskland
Skotland-Føroyar

**10. september**
Týskland-Skotland
Føroyar-Litava (Toftir)

**11. oktober 2003**
Týskland-Ísland
Skotland-Litava

## Støðan

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Skotland | 4 | 6-4 | 7 |
| 2. | Týskland | 3 | 5-2 | 7 |
| 3. | Litava | 5 | 4-6 | 7 |
| 4. | Ísland | 3 | 4-4 | 3 |
| 5. | Føroyar | 3 | 3-6 | 1 |

## Málskjúttar

| | | |
|---|---|---|
| Eiður Smári Guðjohnsen | Ísland | 3 |
| Tomas Razanauskas | Litava | 3 |
| John Petersen | Føroyar | 2 |
| Michael Ballack | Týskland | 2 |
| Heiðar Helguson | Ísland | 1 |
| Robertas Poskus | Litava | 1 |
| Paul Lambert | Skotland | 1 |
| Barry Ferguson | Skotland | 1 |
| Christian Dailly | Skotland | 1 |
| Gary Naysmith | Skotland | 1 |
| Kenny Miller | Skotland | 1 |
| Lee Wilkie | Skotland | 1 |
| Miroslaw Klose | Týskland | 1 |
| Carsten Ramelow | Týskland | 1 |
| Sjálvmál | | 2 |

## Dystir í 2003

Vinardystur 27. apríl: Føroyar-Kasakstan, Tofta leikvøllir, Toftir
Vinardystur 29. apríl: Føroyar-Kasakstan, Tórsvøllur, Tórshavn
EM-dystur 7. juni: Ísland-Føroyar, Laugardalur, Reykjavík
EM-dystur 11. juni 19:45: Føroyar-Týskland, Tórsvøllur, Tórshavn
EM-dystur 20. august: Føroyar-Ísland, Tórsvøllur, Tórshavn
EM-dystur 6. september: Skotland-Føroyar, Hampden Park, Glasgow
EM-dystur 10. september: Føroyar-Litava, Tofta Leikvøllur, Toftir



*Fróði Benjaminsen, sum hevur spælt 18 ferðir á landsliðnum, hevur saman við liðfeløgunum nógvar spennandi uppgávur fyri framman. Stórdysturin ímóti Týsklandi í juni er helst mest spennandi dysturin í ár.*

Mynd: Álvur Haraldsen

## Málskjúttar á landsliðnum

| Spælari | Dystir | Mál | Spælari | Dystir | Mál | Spælari | Dystir | Mál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Todi Jónsson, FCK | 43 | 9 | Christian Høgni Jacobsen, Vejle | 14 | 2 | Jan C. Dam, HB | 39 | 1 |
| Uni Arge | 37 | 8 | Henning Jarnskor | 35 | 2 | Hans Fróði Hansen, B68 | 23 | 1 |
| John Petersen, B36 | 43 | 5 | Julian Johnsson, B36 | 47 | 2 | Rógvi Jacobsen, HB | 18 | 1 |
| Jan Allan Müller | 34 | 4 | Torkil Nielsen | 18 | 2 | Óli Johannesen, Hvidovre | 59 | 1 |
| Jens Kristian Hansen, B36 | 44 | 3 | Jens Erik Rasmussen, FSV | 25 | 2 | Allan Mørkøre, B36 | 54 | 1 |
| Kurt Mørkøre | 37 | 3 | Kári Reynheim, Fram | 27 | 2 | Sjálvmál | | 2 |
| Øssur Hansen, B68 | 51 | 2 | Fróði Benjaminsen, B68 | 18 | 1 | ***Mál í alt*** | | ***54*** |

## Hesir hava spælt flest landsdystir

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Óli Johannesen, Hvidovre | 59 | John Petersen, B36 | 43 | Kári Reynheim, Fram | 27 |
| Jens Martin Knudsen, NSÍ | 56 | Jan C. Dam, HB | 39 | Tummas Eli Hansen | 27 |
| Allan Mørkøre, B36 | 54 | Kurt Mørkøre | 37 | Magni Jarnskor | 27 |
| Øssur Hansen, B68 | 51 | Uni Arge | 37 | Jóannes Jakobsen | 25 |
| Julian S. Johnsson, B36 | 47 | Henning Jarnskor | 35 | Pól Thorsteinsson, B36 | 25 |
| Jens Kristian Hansen, B36 | 44 | Jan Allan Müller | 34 | Jens Erik Rasmussen, FSV | 25 |
| Todi A. Jónsson, FCK | 43 | Jákup Mikkelsen, Molde | 28 | | |

## Soleiðis hevur tað gingið í altjóða dystum

| Kapping | dystir | vunnið | javnt | tapt | mál |
|---|---|---|---|---|---|
| HM | 30 | 4 | 1 | 25 | 17-92 |
| EM | 31 | 3 | 5 | 23 | 20-84 |
| Vinardystir | 19 | 5 | 4 | 10 | 15-28 |
| NM | 4 | 0 | 1 | 3 | 2-6 |
| ***Í alt*** | ***84*** | ***12*** | ***11*** | ***61*** | ***54-210*** |
| | | | | | |
| Á heimavølli | 35 | 5 | 6 | 24 | 28-88 |
| Á útivølli | 38 | 5 | 3 | 30 | 19-100 |
| Á uttanveltaðum vølli | 11 | 2 | 2 | 7 | 7-22 |
| ***Í alt*** | ***84*** | ***12*** | ***11*** | ***61*** | ***54-210*** |